## Kall gott ár

Árið í fjør var tað besta hjá Kall nakrantíð. Sølan av fjarskiftistænastum var 79,4 mió. krónur í fjør ímóti 63,5 mió. krónum árið fyri. Úrslitið í fjør gjørdist 6,4 mió. krónur, og eginognin bleiv rentað við 38 prosentum í 2006. Bjarni A. Bjarnason, stjóri, sigur, at leiðslan er nøgd við gongdina og úrslitið í fjør, og at starvsfólkið hevur gjørt eitt gott arbeiði. Harafturat er tað hugaligt, at tíðirnar eru góðar, tí tað ger, at nýtslan veksur, sigur stjórin.

## Nýggjur leiðari

Norðoya Kunningarstova, sum heldur til í Klaksvík, hevur fingið nýggjan leiðara. Tað er Maiken Steinberg. Hon er 39 ára gomul og úr Klaksvík. Maiken Steinberg, ið tekur við sum kunningarleiðari eftir Kristian Olsen, sum doyði herfyri, hevur útbúgving í enskum og týskum máli og hevur eisini undirvíst í hesum lærigreinum á handilsskúlanum á Kambsdali. Í løtuni lesur hon spanskt við sjálvlestri á HF-skeiðinum í Klaksvík.

*"Vit kunnu saktans vera við. Vit hava so ómetaliga nógv – og kunnu fáa so nógv at bjóða uppá, sum er púrasta forkunnugt fyri onnur. Vit skulu bara brúka hugflogið, sum er tað mest virðismikla tilfeingið, vit eiga. Tað er bara at bretta uppum armar og at fara í gongd – ikki minst øll tit ungu, sum standa her í dag, og sum eiga framtíðina."*



*Radarkuplarnir og hellið í Sornfelli kunnu gerast áhugavert ferðamál – tað ræður bara um at brúka hugflogið, sigur Elin Heinesen*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

hetta forkunnuga grótslottið uppi á Sornfelli sum ein upplivingardepil til almenningin og vitjandi uttanifrá, við holinum inn í fjallið sum eitt portur inn í ein ævintýraheim. Vit kundu t. d. brúkt hellini har inni til framsýningar bæði fyri børn og vaksin, sum lýstu søgur og sagnir úr Føroyum, umframt konsertir, fundir, skeiðvirksemi – kanska eitt kalda krígs museum, sum kundi vakt internationalan áhuga – you name it – og so gjørt restauratión uppi í kuplunum við útsýni yvir allar Føroyar – fjallatoppar so langt eygað røkkur góðar dagar. Um so slavin luft hongur um kuplarnar – ella veðrið uppá aðrar mátar vísir tenn – so ger tað minni, tí tað er eisini ein partur av upplivingini. Staðið er so hugtakandi í sær sjálvum, at tað er ein heilt serstøk uppliving undir øllum umstøðum bara at vera har. Hetta hevði uttan iva verið ein so attraktiv og sansarúsandi heildarupplivin, at tað skjótt hevði verið at frætt um tað um allan heim!

Og so tað besta av øllum: Í roynd og veru høvdu vit kunnað útbygt staðið lutvíst bíliga til hetta ævintýrliga endamálið, tí tað er jú bygt frammanundan. Vegurgongur allan vegin niðan. Har er eitt slættað øki til parkering. Høgligari kundi tað ikki verið. Um staðið varð brúkt á ein slíkan hátt, høvdu vit fingið eitt stórfingið vartekin fyri Føroyar – eitt eindømi í øllum heiminum – enntá við altjóða søgu aftanfyri. Um vit bera okkum rætt at, kundi hetta staðið saktans blivið heimsgitið við potentiali til at draga fólk úr øllum heraðshornum. Fólk høvdu valfartað higar fyri at uppliva hetta, tí hvør kundi ikki hugsað sær at uppliva eitt ævintýraslott, sum røkkur uppum skýggini við útsýni um næstan allan heim, og sum einaferð var ein loynilig militerbasa! Hvussu nógva staðni í heiminum kann man koma til at uppliva tað – so lætt og so høgligt? Hvør kundi ikki hugsað sær at farið við sínum børnum til The Misty Fairy Islands with the Magical Mystery Castle in the skies... Ævintýraoyggjarnar langt burturi í tokuni við gandaslottinum uppi millum skýggja. Hugsa sær, hvussu nógv virði tað hevði kunnað skapt fyri føroyska samfelagið, um vit kundu bjóðað uppá eina slíka stórfingna uppliving? Hugsa sær, hvussu nógv fólk – m.a. peningaíleggjarar úti í heimi, vit høvdu kunnað hugtikið við at vísa nakað so heilt einastandandi fram fyri teimum?

### Ómetaliga nógvar møguleikar

Ja... eg kundi hildið á... men nú er hugskotið varpað út. Sum eg segði í byrjanini av hesari røðuni: Eg síggi, at her liggja so óendaliga nógvir ótroyttir møguleikar í Føroyum – ikki minst fyri einastandandi upplivingum – og í hesum tíðum, har upplivingarbúskapurinskapar størstu virðini í heiminum, so lat okkum vera við! Vit kunnu saktans vera við. Vit hava so ómetaliga nógv – og kunnu fáa so nógv at bjóða uppá, sum er púrasta forkunnugt fyri onnur. Vit skulu bara brúka hugflogið, sum er tað mest virðismikla tilfeingið, vit eiga. Tað er bara at bretta uppum armar og at fara í gongd – ikki minst øll tit ungu, sum standa her í dag, og sum eiga framtíðina. "